FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

**Leiðslufundur 19. apríl 2016**

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Til staðar á fundinum vóru:<br><br>Avboð: | Sigurð í Jákupsstovu (SíJ), Janus Jensen (JJ), Turið Sigurðardóttir (TS), Hans Andrias Sølvará (HAS) og Jørgen Meitilberg (JM)<br><br>Hans Pauli Joensen (HPS) |
| Skrivað hevur: | JM |
| Fundartíð: | týsdagur, 19. apríl 2016 |
| Fundarstað: | SSS |

**Mál til umrøðu:**

1. **Avrikssáttmáli við MMR**

Uppskotið til avrikssáttmála varð gjøgnumgingið. Leiðslan er samd um, at avrikssáttmálin verður sendur starvsfólkunum til hoyringar í hesi vikuni. Eftir ætlan verður sáttmálin lagdur fram á stýrisfundi tann 17. mai 2016.
Kunningarskriv verður sent út í sambandi við hoyringina, soleiðis at starvsfólk vita, hvat avrikssáttmálin við Mentamálaráðið snýr seg um. SíJ tillagar sáttmálan og orðar kunningarskriv.

2. **Diplomútbúgving í listaligum arbeiði**

Talan er um 2 ára diplomútbúgving á 120 ECTS. Seturslógin nevnir ikki beinleiðis 2 ára diplomútbúgving, so hetta má kannast, áðrenn útbúgvingin verður send Mentamálaráðnum til góðkenningar.

Lýsingin av útbúgvingini ásetir einki um upptøkutreytir, hetta skal eisini kannast nærri.

3. **Ymiskt**

Freistin at søkja inn á Setrið eftir kvotu 2 var fríggjadagin 15. apríl á midnátt. Men ein servarauppdatering, sum fór í gongd kl. 20 fríggjakvøldið, førdi við sær, at upptøkuskipanin ikki riggaði. Fyri at tryggja at eingin umsøkjari datt niðurímillum, varð avgerð tikin, at leingja freistina til mikudag 20. apríl kl. 24.

Treytir fyri fulltíðarlestur skulu orðast greiðari. Málið verður lagt til Lestrarskrivstovuna at avgreiða.

/JM